# Kjak



Bergtóra Høgnadóttir

## Givin í Hoydølum – hvat nú?

Í ár eru nógv fleiri miðnámsskúlanæmingar givnir í Hoydølum enn undanfarin ár. Tá skúlaárið byrjaði vóru 700 næmingar í Hoydølum – nú eru 670, sambært grein í Sosialinum í farnu viku. Sostatt er meir enn ein heilur skúlaflokkur givin! Skilti í greinini, at ein partur av orsøkini var, at tey ungu nú bert fingu tvær ávaringar, áðrenn tey mistu rættin at ganga í skúla.

Sólarklárt er nú, at tað er ikki nóg mikið bert at siga: allir skikkaðir umsøkjarir sleppa á miðnámsskúla. Gamaní er tað eitt framstig, men hvussu nógv er vunnið hjá teimum sum gevast? Hvørjar møguleikar hava tey? Vit mugu vakna og gera verulig átøk, so tey ungu hava ein meiningsfullan gerandisdag við fjølbroyttum møguleikum – eisini um miðnámsskúlin ikki var tað rætta. Ella kann miðnámsskúlin kanska eisini gerast meir fjølbroyttur? Eg vóni, at mentamálaráðið eftirmetir skúlaárið við miðnámsskúlanæmingar og ikki minst lestrarvegleiðarar.

### Avbjóðingarnar

Ungu dreingirnir og genturnar, sum onkusvegna gevast teljast millum tey, sum hava truplast við at fáa eitt starv. Orsøkirnar eru fleiri:

- Tey ungu hava ofta ongar arbeiðsroyndir at vísa á
- 80% av teimum sum eru arbeiðsleys hava onga útbúgving
- Lættari er at fáa starv um ein longu hevur eitt starv
- Neyvan er sjálvsálitið í 'topp', tá tey júst eru vrakað ella sjálvi hava valt at gevast í Hoydølum
- Óhugnalig fá alternativ eru sum er í Føroyum

### Hvørjir møguleikar hava tey sum er?

Tey sum eru givin í Hoydølum er neyvan 18 ár og eru sostatt ikki skrásett nakra staðni – eingin sendir boð eftir teimum - og rættindi til útgjald frá ALS ella Almannastovuni hava tey oftast heldur ikki. Lærlingaplássini eru órímiliga fá í tali. Soleiðis kunnu hesi ungu menniskju nú fáa kensluna av, at eingin í samfelagnum veruliga VIL tey.

### Møguleikarnir tey áttu at fingið

Talið á lærlingum hjá almennum arbeiðsgevarum kunnu teljast á tveimum hondum, hóast læruplláss avbera væl kundu verið ein gongd leið hjá teimum, sum onkusvegna ikki halda miðnámsskúla vera rætta leiðin. Ella um hin ungi heldur vil hava eina útbúgving, sum er meiri praktisk enn teoretisk. Dugni, skúlin við Áir sum er einasti skúlin til teirra sum hava avbjóðingar fysiskt, psykiskt ella sosialt rúmar bert einum av trimum umsøkjarum við verandi játtan.

Eisini eigur at verða gjørligt, hjá øðrum enn elituni at taka studentsprógv upp á 4 ár. Slíkt tilboð kundu eitt nú ungir stakir uppihaldarar havt gagn av. Eisini nøkur teirra sum hava ávísar avbjóðingar: fysiskt, sálarliga ella sosialt. Havi skilt, at møguleikin fyri at taka nakrar einkultar lærugreinar í senn heldur ikki er ein møguleiki – uttan so at fólk eru sjálvlesandi. Haldi hetta ljóðar eitt sindur stirvið.

*Tað er av alstórum týdningi at tryggja, at tey hava kensluna av at brúk er fyri teimum*

Kann ímynda mær, at nøkur teirra sum søkja inn á miðnámsskúlan sum tíðirnar eru velja hettta, tí eingi alternativ eru. Tí kundi kanska eisini verið eitt hugskot, um fólk í størri mun vera latin í til aftur at seta seg á skúlabonk – hugsi um summarskeið í ávísum lærugreinum ella kanska samrøður um okkurt er sum skal 'vendast', áðrenn tey eru púra klár at seta seg á skúlabonk.

### Framtíðin

Fyri lítlum ári síðani var latið landsstýrinum eitt álit um,

*Sólarklárt er nú, at tað er ikki nóg mikið bert at siga: allir skikkaðir umsøkjarir sleppa á miðnámsskúla*

hvussu ungdómsarbeiðsloysið kundi fyribyrgjast og gerast minni í Føroyum - longu áðrenn handanina var avgerð tikin um fleiri miðnámsskúlapláss og nýggja ALSlógin hevði latið upp fyri møguleikanum um virkisprakitikk, sum tíbetur er vorðin veruleiki. Sostatt kann staðfestast, at eingi nýbrot ella átøk eru gjørd til tess at fyribyrgja ungdómsarbeiðsloysinum í Føroyum eftir at álitið er handað. Tjóðveldi hevur roynt at víst á møguleikar fyri fleiri prakitkk -og lærlingaplássum. Vit halda tað vera rímiligt at seta krøv bæði til privatar og almennar arbeiðsgevarar. Ikki minst, tá talan er um stórar verkætlanir. Hesi eri uppskot er tó feld.

Ungu menniskjuni eru fjølbroytt og tað er ein styrki – tí má útboðið og møguleikar teirra eisini vera fjølbroyttir. Tí er av alstórum týdningi at tryggja, at tey hava kensluna av at brúk er fyri teimum. Til tess at fyribyrgja at óhepna gongdin heldur áfram setir undirritaða landsstýriskvinnuni í mentamálum hesar spurningar:

1. Hvussu nógv eru givin í miðnámsskúlunum í Føroyum skúlaárið 2010 – 11?
2. Hvørjar eru orsøkirnar til at so nógv eru givin?
3. Eru átøk gjørd til tess at fyribyrgja at so nógv gevast?
4. Eru ætlanir um at eftirmeta hetta við eitt nú lestrarvegleiðarunum og næmingum í miðnámsskúlunum?
5. Átti kunngerðin at blivi broytt, so til bar at taka nøkur einkultfak í senn uttan at vera sjálvlesandi?
6. Átti møguleiki at verið hjá øðrum enn elituni at tikið studentsprógv upp á 4 ár?
7. Hví fáa næmingar í dag færri ávaringaqr enn áður, áðrenn tey missa lestrarpláss sítt?
8. Ætlar landsstýriskvinnan at gera nakað ítøkiligt til tess at skapa fleiri lærupláss hjá bæði almennum og privatum arbeiðsgevarum?



Jan A. Joensen

## Framburð og menning aftur á breddan við UNIKLAX

**Skulu vit sum tjóð hava møguleika at kappast við aðrar tjóðir- ikki í stórleika ella fólkatali, men í kappingarføri á vørum og í prísi, tá er neyðugt við meira útbúgving.**

Fyri stuttum skrivaði eg greinastubba um, at 'Sjálvstýrisflokkurin vil útbúgving- og vit meina tað' Og vit meina tað framvegis!

Sjálvstýrisflokkurin hevur aftur lagt uppskot fram um, at skipa hægri lestur í Klaksvík og kring landið annars.

5.mai var á Føroya Løgting fyrsta viðgerð av tingmál 192/2010 Uppskot til samtyktar um UNIKLAX- Vit meina tað enn.

Fremsta endamál Sjálvstýrisfloksins hevur altíð verið, menning og framburð.

Hvørt vit vilja tað ella

*Lat okkum gera allar føroyar til eitt áhugavert lestrar- og menningarstað*

ikki, so er vitan tað sum hevur flutt okkum. Gomul-saman við nýggjari vitan er tað sum hevur flutt okkum. Og føroyingar hava flutt seg ómetaliga nógv seinastu 150 árini.

### Vit mugu allatíðina vinna longur fram

Skulu vit sum tjóð hava møguleika at kappast við aðrar tjóðir- ikki í stórleika ella fólkatali, men í kappingarføri á vørum og í prísi, tá er neyðugt við meira útbúgving. Útbúgving sum kann koma vinnuni til gagns, vónandi eisini nýggjum vinnum og harvið møguleikanum at varðveita størsta partin av ungdóminum.

### Vit skulu hava fleiri UNIKLAX

Skulu Føroyar ikki fara frá at framleiða ull, til 20 p. blokkar- til 5 p. blokkar av fisk, til laksaportiónir- til ungdóm í stórum tali, tá er neyðugt, at vit sum tjóð áhaldandi royna at førleikamenna okkum - at vit geva okkara ungdómi møguleikan at førleikamenna seg í føroyum.

Hvørt manndómsprøvin hjá okkara nýggja ættarliði er at royna 'nýggju brúnna' um Streymin ella ein túr við Smyrli er av minni týdningi. Álvaratos kunnu vit senda føroyingar út í stóru verð at læra og arbeiða- men megna ikki teir 3. tímarnar úr Suðuroy til Klaksvíkar ella øvugt.

Lat okkum gera allar føroyar til eitt áhugavert lestrar- og menningarstað.